# Stanley og dóttirin Astrid í Miðlahúsinum

**Stanley og Astrid fara at syngja og spæla hóskvøldið. Fult hús er altíð, tá Stanley Samuelsen hevur konsert í Miðlahúsinum**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Í kvøld hóskvøldið klokkan 20 verður forvitnislig konsert í Miðlahúsinum í Vágsbotni, har høvið enn einaferð verður at hoyra Stanley Samuelsen syngja og spæla. Hesaferð verður tað saman við dóttrini Astrid, sum eisini fer at syngja og spæla saman við pápanum. Tað verða bæði nýggir og eldri sangir á skránna. Konsertin byrjar klokkan 20. Hetta verður sostatt fyrstu ferð, at almenningurin fær høvi at hoyra nøkur av løgunum, sum verða við á hansara komandi nýggju fløgu, sum væntandi kemur út í heyst. Serliga áhugavert verður tað eisini at hoyra 19 ára gomlu dóttrina, Astrid. Hon fer at syngja mest á enskum men syngur eisini á svenskum og sponskum. Hon fer m.a. at sygja sangir eftir George Harrisson og Silvio Radríguez, sum verður kallaður tann kubanski Bob Dylan. Kostnaður til konsert í Miðlahúsinum 70 kr. Konsert verður eisini á bókasavninum í Fuglafirði fríggjakvøldið kl. 20 og í bygdahúsinum í Miðvági leygarkvøldið.



## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av útsynningi og sirm av og á, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av landsynningi og seint um kvøldið regn. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og landsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, seinnapartin ælingur. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin lot av ymsum ættum og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Týsdagin veksur hann vindin av landnyrðingi og ælingur, partvís vátaslettingur. Hitin millum 3 og 7 stig.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -2 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 12 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 9 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 9 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 22 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 13 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 11 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lagtrýst, 985 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing eystan og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum komandi samdøgur.



**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer spakuliga norðureftir og dýpist. Tað gevur nógvan vind á okkara leiðum leygardagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/4 kl. $06^{00}$ – 21/4 $06^{00}$. Hitin í gjár: 5,2°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 20/4 kl. $06^{00}$ – 21/4 $06^{00}$.
Avfallið higartil í apríl: 33 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

20.apríl Fullmáni
23.apríl Mánin longst frá jørðini
28.apríl Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24.apríl | 10:19 | 22:41 | 9:19 | 21:41 | 9:34 | 21:56 | - | 12:19 | 0:57 | 13:19 | 8:34 | 20:56 |
| 25.apríl | 11:04 | 23:26 | 10:04 | 22:26 | 10:19 | 22:41 | 0:41 | 13:04 | 1:41 | 14:04 | 9:19 | 21:41 |
| 26.apríl | 11:49 | - | 10:49 | 23:12 | 11:04 | 23:27 | 1:26 | 13:49 | 2:26 | 14:49 | 10:04 | 22:27 |
| 27.apríl | 0:12 | 12:34 | 11:34 | - | 11:49 | - | 2:12 | 14:34 | 3:12 | 15:34 | 10:49 | 23:24 |
| 28.apríl | 1:09 | 13:44 | 0:09 | 12:44 | 0:24 | 12:59 | 3:09 | 15:44 | 4:09 | 16:44 | 11:59 | - |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24.apríl | 7:34 | 19:56 | 10:34 | 22:56 | 11:34 | 23:56 | 10:04 | 22:26 | 11:19 | 23:41 |
| 25.apríl | 8:19 | 20:41 | 11:19 | 23:41 | - | 12:19 | 10:49 | 23:11 | - | 12:04 |
| 26.apríl | 9:04 | 21:27 | - | 12:04 | 0:41 | 13:04 | 11:34 | 23:57 | 0:26 | 12:49 |
| 27.apríl | 9:49 | 22:24 | 0:27 | 12:49 | 1:27 | 13:49 | - | 12:19 | 1:12 | 13:34 |
| 28.apríl | 10:59 | 23:34 | 1:24 | 13:59 | 2:24 | 14:59 | 0:54 | 13:29 | 2:09 | 14:44 |




Alt um harmonikur

www.simme.eu